# vegamóti



*– Tað er ein øgiligur mangul upp á tilfar um samtíðina, og tilfar sum viðger nútíðina. Og tað er frustrerandi, staðfesta ritstjórarnir*
*Mynd: Sunva Eysturoy Lassen*

*Tá ið kreppan leikaði harðast á fyrst í nítiárunum, vóru vit "Nordatlantens bananrepublik". Hesa ferð luktaði myndin ikki sørt av "Nordatlantens talebanrepublik"*

Bjørt Samuelsen - brot úr »Krossvegir«

*Miðfloksins stevnuskrá er púra greið. Frælsi hins einstaka skal skerjast. Trúarfrælsið skal skerjast. Talufrælsið skal skerjast. Sum heild - vælkomin til Iran!*

Sjúrður Skaale - brot úr »Krossvegir«

*Bondini millum stat og kirkju, har tann evangeliskt-lutherska fólkakirkjan hevur eina serstøðu, skulu varðveitast*

Inga Poulsen Dam - brot úr »Krossvegir«




*- Ein høvuðsmotivatión til bókina er, at vit sakna hetta slagið av bókum. Tað eru mest siðsøguligar bøkur, sum koma út í Føroyum. Alt gott um bøkur um skiparar, men hvussu nógvar debattbøkur koma út um Føroyar og okkara samtíð? spyrja Heini í Skorini, v.m., og Páll Holm Johannsesen, h.m., í nýggju bókini »Krossvegir«, sum Sprotin gevur út í næstu viku*

## Um Krossvegir

HESI HAVA SKRIVAÐ:
Sjúrður Skaale
Rúni Rasmussen
Bjørt Samuelsen
Frants Jensen
Firouz Gaini
Símun Absalonsen
Kristianna Winther Poulsen
Meinhard Jensen
Katrin Petersen
Armgarð Arge
Tórður Jóansson
Inga Poulsen Dam
Flóvin S. Olsen
Páll Holm Johannesen
Heini í Skorini

Forlagið Sprotin gevur bókina út, sum fæst til keyps fyri 260 krónur

at at skapa forstáilsi og tilfar um okkara samtíð, heldur Páll.

- Vit skulu jú øll vera her, leggur hann afturat.

## Margfeldar meiningar

- Ofta hevur verið fokuserað upp á tað negativa, men hetta kann eisini vera ein mennandi prosess, um vit læra at kjakast um hetta. Tað var tað tó ikki við 266b, staðfestir Heini, og sipar til, um vit yvirhøvur lærdu at kjakast.

Heini og Páll undirstrika tó báðir, at endamálið als ikki er at reinsa føroyska kjakið fyri tað heita blóðið, ið viðhvørt kann koma í kók, tá kjakið hitnar. Men aðalmálið er at hækkastøðið, staðfesta teir.

Tá Páll og Heini settu seg niður at stjórna bókini, skrivaðu teir fyrst eina sokallaða problemformulering til tey, teir høvdu í huga at skriva um ymisk evni. Teir løgdu seg eftir, at fáa fjølbroytni fram og heittu tí á bæði kvinnur og menn í ymiskum aldri og úr ymiskum samfelagsbólkum.

Ella sum Heini so andbráður orðar tað: Frá tí mest harðkókaða ateistinum til tað etableraða fríkirkjufólkið!

- Vit royndu at heita á fólk, sum vistu hava ein góðan penn, og sum hava fingist við evnið, staðfesta teir báðir ungu ritstjórarnir. Teir siga, at hóast talan er um kend andlit, so er eingin beinleiðis etableraður rithøvundar millum essayistarnir í »Krossvegir«.

Páll og Heini greiða frá, at talan er um skrivandi fólk við ymiskum stíli. Summi hava skrivað eitt slag av polemiskum manifesti, onnur eru meira litterer og hóvlig, meðan ískoytini hjá øðrum meira kunnu bólkast sum kronikkir.

## Klassiskt kjak

*Men er nakað broytt í Føroyum, nú bókin kemur út í november 2007 í mun til somu tíð í fjør, tá kjakið var upp á tað harðasta?*

- Nei, tað haldi eg ikki, sigur Heini, men minnir samtíðis á, at evnið í bókini »Krossvegir« er tíðarleyst, og kjakið um viðurskiftini millum átrúnað og stat er klassiskt, sum hann málber seg.

Spurdir, um bókin kann metast sum eitt ískoyti til løgtingsvalið, sum standar til, siga Páll og Heini við ein munn, at tað er tað ikki.

- Løgtingsvalið kundi verið útskrivað áðrenn bókin kom út, sigur Páll, men leggur afturat, at flokkar sum t.d. Tjóðveldi og Miðflokkurin neyvan hava nakað ímóti at taka slík evni upp.

- Hetta er ikki eitt valinnlegg, men eitt ískoyti til samfelagskjakið, og til tað, sum redaktiónirnar ikki hava orku til at viðgera, sigur Heini.